Hotel Føroyar:

# Hotellið fyri øll



*Johannes Jensen er nýggjur stjóri á Hotel Føroyum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**1. januar í ár tók Johannes Jensen við starvinum sum nýggjur stjóri á Hotel Føroyum við Oyggjarvegin. Hetta fer tó ikki at ávirka hotellið í fyrstu syftu. Enn eru ongar ítøkiligar ætlanir gjørdar um broytingar, tí fyrst og fremst ætlar stjórin at seta seg inn í tingini**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Stásiliga hotellið við Oyggjarvegin fekk 1. januar nýggjan stjóra. 39 ára gamli Johannes Jensen er settur í starv, sum stjóri á Hotel Føroyum. Johannes er útbúgvin MBA, Master of Business Administration, sum er ein útbúgving í virkisleiðislu, og hevur hann seinastu árini starvast sum marknaðarleiðari á Føroya Fiskasølu.

Foreldur Johannes høvdu í sínari tíð hotellið niðri á Kongabrúnni í Havn. Spurdur um hetta var nakað, ið lá í blóðinum, svarar Johannes Jensen:

– Nei, tað haldi eg ikki. Eg gekk í Hoydølum tá hetta hotellið varð bygt, og alt mítt vaksna lív havi eg onki havt við hotell-vinnu at gera. Eg eri hvørki receptionist, kokkur ella tænari, so alt mítt vaksna lív hevur ikki verið merkt av hotell-lívinum. Men at foreldrini høvdu hotellið niðri á Kongabrúnni merkir jú, at eg eri uppvaksin við tí.

### Betra tænastuna

Johannes Jensen sigur, at ætlanin er um at betra um tænastuna á Hotel Føroyum og gera hotellið til eitt hotell fyri øll.

– Úrslitini seinastu árini hava verið nøktandi, greiðir Johannes Jensen frá.

– So ongar broytingar eru á skránni í løtuni. Hotellið koyrir væl sum er, og heldur ikki vera nakrar starvsfólkabroytingar. Sjálvandi kann man altíð broyta til tað betra. Leisturin, ið vit fara at leggja okkum eftir er, at gera Hotel Føroyar til hotellið fyri øll – útlendingar og føroyingar.

Sambært Johannes so er spurningurin at nøkta nakrar tørvir og veita tænastur har eftirspurningurin er. Á jólum hevur hotellið skipað fyri nøkrum jólafrokostum, og nú tað so spakuliga líður móti summri fer hotellið at savna seg um tær útlendsku vitjanirnar. – Pláss skal vera fyri øllum, sigur Johannes Jensen. – Brúdleyp, fermingar, ráðstevnur og so framvegis. Men sum nú er, eru ongar ítøkiligar ætlanir gjørdar. Ætlanin er nú at seta meg inn í tingini, so ætlanir kunnu verða lagdar.

Hotel Føroyar er dóttirfelagið hjá Smyril Line, og sigur Johannes Jensen, at tað er heilt vist ein fyrimunur at hava eina slíka fyritøku aftanfyri seg, sum kann stuðla í sambandi við útlendskar vitjanir.

Sosialurin ynskir Johannes Jensen hjartaliga tillukku við nýggja starvinum og alt tað besta í framtíðini.

UTTAN ÚR HEIMI

# Skip við vandamiklari last fór á land

**Myndugleikarnir í Suðuronglandi hava flutt fólkið úr bygdini Kingsand, eftir at eitt tangaskip fór á land nærhendis bygdini**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað kypriskt skrásetta tangaskipið “Willy” brotnaði av um tvøran mikumorgunin, og myndugleikarnir bóru ótta fyri einari spreinging umborð, tí skipið var fermtn við sera vandamiklum bensingassi.

Stutt eftir at skipið brotnaði, varnaðust myndugleikarnir, at hol var komið á onkran av tangunum ella kanska fleiri, tí bensin var at síggja á sjónum. Tí varð avgjørt at banna allari skipaferðslu har á leiðini.

Kingsand er tætt við innsiglingina til tann stóra havnarbýin Plymouth, har bretski herflotin eisini hevur eina støð. Tað 3000 tons stóra tangaskipið lá fyri akkeri í Plymouthsundinum, men rak á land.

Teir tólv menninir, sum vóru við skipinum, vórðu beinan vegin fingnir í land.

Bretsku myndugleikarnir siga, at tað fer at taka drúgva tíð at rudda økið kring staðið, har skipið fór á land.



*Mynd: Reuters*

# Tey ríku londini royndu at forða umhvørvisráðstevnunum

**Sjey av teimum ríkastu ídnaðarlondunum royndu í 1972 at forða teirri fyrstu altjóða ráðstevnuni um hóttanirnar ímóti heimsins umhvørvi**

ÚTLAND
*Fartekst*

Ætlanin hjá teimum sjey londunum hevur higartil verið hildin loynilig, men er avdúkað í bretskum skjølum, sum almenningurin júst hevur fingið innlit í.

Undan teirri fyrstu altjóða umhvørvisráðstevnuni í Stockholm fyri 30 árum síðani var dúgligt loyniligt fundarvirksemi millum umboðsmenn úr sjey londum. Har viðgjørdu londini spurningin, hvussu tey best kundu verja síni búskaparligu áhugamál ímóti kostnaðarmiklum umhvørvisverndartiltøkum.

Í Bretlandi hava myndugleikarnir júst givið almenninginum atgongd til fundarfrásagnirnar frá hesum viðgerðunum, tí skjølini nú eru meira enn 30 ára gomul.

Í frásagnunum sæst, at tey sjey londini, sum vóru uppi í teimum loyniligu samráðingunum, vóru Bretland, Frakland, USA, Vesturtýskland, Holland, Belgia og Italia.



TV3 skal sløkkjast 1. februar:

# Eingin avgerð tikin enn

*– Borgararnir hava verið ógvuliga glaðir fyri Rás Tórshavn, og hetta er eisini nakað, sum vit politikarar hava lagt til merkis, og vit vilja sjálvandi gera okkara fyri, at hetta verður verandi ein tænasta til borgararnar, sigur Jan Christiansen*



**Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn, veit framvegis ikki at siga, hvussu verður við lagnuni hjá Rás Tórshavn í framtíðini. Hann ásannar, at hetta er eitt mál, ið liggur nógvum borgarum ógvuliga nær, og tí er ætlanin at finna eina góða loysn**

RÁS TÓRSHAVN
*Heri á Rógvi*

Í løtuni sendir Rás Tórshavn BBC Prime, BBC World, Eurosport, MTV og TV3. Tað er henda síðstnevnda, sum seinastu tíðina hevur verið javnan frammi millum manna. Tað er nú einaferð soleiðis, at Viasat, sum tekur sær av TV3, vil hava Tórshavnar Kommuna at gjalda fyri at senda TV3 út til borgararnar í kommununi. Hetta gjaldið skal eftir ætlan vera góðar 800.000 kr. um árið ella 10,19 kr. um mánaðin fyri hvørt húsarhaldi í kommununi, og tað eru eini 6.000 húsarhald í kommununi.

Í løtuni er tað soleiðis, at Tórshavnar Kommuna má lata 200.000 kr. fyri hvørja av Prime, World og MTV, men Eurosport verður tikin niður og send ókeypis til allar borgarar, sum kunnu kalla seg fyri havnaborgarar.

Tað var í 1988, at Rás Tórshavn sá dagsins ljós fyri fyrstu ferð. TV3 hevur verið við frá byrjan, men tað hevur verið eitt sindur skiftandi, hvussu barnið hevur itið, tí vit hava havt bæði skandinaviskt og norskt TV3.

### 1. februar

Tað skal eftir ætlan sløkkjast fyri TV3 hin 1. februar í ár. Upprunaliga skuldi hetta verið gjørt á nýggjárinum, men tað eydnaðist býráðnum at fáa útsett freistina. Tað verður býráðið sjálvt, sum skal sløkkja fyri TV3 hin 1. februar.

– Vit fara undir ongan umstøðum at gera nakað ólógligt, so vit vera noyddir til at sløkkja fyri TV3, um ongin loysn er funnin, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður.

Býráðsformaðurin sigur, at teir kunnu ikki siga nakað um, hvussu verður við Rás Tórshavn, tí enn er ongin støða tikin til málið, og málið er heldur ikki viðgjørt enn í býráðnum.

– Tað verður í øllum førum rættiliga trupult at fáa hetta at ganga upp, tí fíggjarætlanin er longu løgd fyri árið, og tað er ikki lætt at finna so nógvar pengar, sigur Jan Christiansen.

Býráðsformaðurin vil tó ikki útihýsa nøkrum møguleika viðvíkjandi hvør rás, ið kundi komið ístaðin fyri TV3. Hann útihýsir heldur ikki tí møguleika, at eingin nýggj rás kemur í staðin fyri TV3.

### Glað fyri Rás Tórshavn

Frá royndum veit Jan Christiansen væl, at Rás Tórshavn er nakað, sum liggur flestu borgarunum í kommununi rættiliga nær.

– Borgararnir hava verið ógvuliga glaðir fyri Rás Tórshavn, og hetta er eisini nakað, sum vit politikarar hava lagt til merkis, og vit vilja sjálvandi gera okkara fyri, at hetta verður verandi ein tænasta til borgararnar, sigur Jan Christiansen.

Jan Christiansen ásannar tó, at hevði støðan verið sum í dag, so hevði tað verið ógvuliga ivasamt, um Rás Tórshavn nakrantíð hevði verið til veruleika, tí kostnaðurin er so stórur.



*30. november 1995 høvdu skúlanæmingar í Havn fingið nokk, nú Rás Tórshavn ikki sendi MTV longur. Enn er tó eingin mótmælisgonga fyrireikað um TV3*

# Parabolir stinga seg upp

**Tað eru alsamt fleiri havnafólk og fólk aðrastaðni í Føroyum, sum keypa sær sína egnu útgerð, so møguleiki er fyri at síggja fylgissveinasjónvarp**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Upprunaliga hugskotið við Rás Tórshavn var, at tað skuldi minkast um parabolirnar, sum stungu seg upp sum hundalond í Havnini. Eisini var tað ógvuliga dýrt at keypa sær tílíka útgerð. Hetta er tó broytt nú, og í dag kunnu vanlig húski rímiliga bíliga skaffa sær eina parabol við tí, ið hartil hoyrir.

Bæði hjá Opus í Runavík og Radiohandilinum í Havn verður upplýst, at sølan gongur óføra væl við tílíkari útgerð. Fólk standa mestsum í kø fyri at ogna sær útgerðina

Hetta er tó bert galdandi fyri ein serligan programmpakka, sum gongur undir heitinum Canal Digital. Sum orðið eisini sigur, so er talan um talgildar rásir, og hesar síggjast og hoyrast avbera væl, um tað altso ber til at fáa signal við tær.

Enn ber til at síggja fleiri rásir analog, men hetta gerst støðugt meira sjálvsamt, og framleiðarnir eru mestsum hildnir uppat at framleiða tílíka útgerð.

### TV3 er dýrt

Úr Opus úr Runavík, sum selir tílíka útgerð, verður upplýst, at tað er ein størri íløga, um tú ætlar at síggja TV3 digitalt. Kostnaðurin kann lættliga liggjan omanfyri 20.000 kr. Tað er væl bíligari analog, men hetta er, eftir hvat skilst, ógvuliga óvist í framtíðini.

Tilboðið, sum Tórshavnar Kommuna hevur fingið fyri TV3 er umleið 130 kr. um árið. fyri at síggja TV3, og bara hana. Tað skal tó viðmerkjast, at aloftast er talan um programpakkar, so tað kann vera eitt sindur torført at samanbera.

# SVF eigur rættindini

**– Skal Rás Tórshavn undir at senda DR, so skal Sjónvarp Føroya fyrst loyva hesum, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri**



*Mikkjal Helmsdal skal fyrst siga ja, um Rás Tórshavn skal undir at senda DR.*

RÁS TÓRSHAVN
*Heri á Rógvi*

Á heimasíðuni hjá Sosialinum (www.sosialurin.fo) hevur seinastu tíðina verið møguligt at greiða atkvøðu um, hvør rásin skal koma í staðin fyri Rás Tórshavn. Langt frammanfyri kappingarneytarnar er DR ella Danmarks Radio.

Hetta verður tó ikki bert sum at siga tað, tí Sjónvarp Føroya eigur einkarrættin til DR í Føroyum, upplýsir Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri.

Hann sigur, at teir hava givið loyvi til, at Canal Digital kann senda DR í Føroyum, tí so nógv hava longu henda pakkan.

SVF sendir samanlagt einar 2.600 tímar um árið. Sum nú er, so kann Sjónvarp Føroya senda so nógv tilfar frá DR, sum teimum lystir, og hetta verður eisini dúliga gjørt. Saman við tilfarinum frá TV2, so myndar hetta bróðurpartin av senditíðini hjá SVF, upplýsir Mikkjal Helmsdal.

– Vit hava fasta avtalu við TV2, sum inniber at vit keypa minst 520 tímar um árið, sigur Mikkjal Helmsdal.

Sum Sosialurin skilir, so er tað rættiliga trupult at fáa hendur á TV2, soleiðis at tað bert eru heilt fá í Føroyum, ið síggja donsku rásina TV2.

Mikkjal Helmsdal sigur, at kemur ein fyrispurningur frá Tórshavnar Kommunu, um at sleppa at senda DR, so verður hesin svaraður tá, ikki fyrr.